ALMANNA– OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

3. februar 2023
Mál: 23/02412
Tygara skriv:
Viðgjørt: Ann Kristina S. Simonsen

Nr. 52-056/2022

Svar uppá skrivligan fyrispurning nr. 52-056/2022 eftir tingskipanini § 52a til Sirið Stenberg, landsstýrismann í almanna- og mentamálum, frá Sólvit Emilsson Nolsø, løgtingsmanni, um umlættingar- og frítíðartilboð.

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

Spurningar:

1. Hvørjum loysnum arbeiðir landsstýrismaðurin við, so tørvurin á umlættingar- og frítíðartilboðum verður loystur?

2. Hvørjum loysnum arbeiðir landsstýrismaðurin við, so tørvurin á bústovnum og sambýlum til fólk, sum bera brek, verður loystur?

Svar:
Almannaverkið hevur umlagt part av sínum virksemi, ið ger at fleiri børn kunnu fáa frítíðartilboð, og arbeitt verður støðugt við at finna loysnir, soleiðis at børnini, ið standa á bíðilista, fáa tilboð.

Í fíggjarlógaruppskotinum, ið fall burtur, var ætlanin at hækka játtanina til frítíðartilboð. Landsstýriskvinnan heldur fast í hesi raðfesting í fíggjarlógaruppskotinum, ið verður lagt fyri Løgtingið í næstum.

Orsøkin til bíðilistarnar er samansett, og tí verða spurningarnar svaraðir undir einum.

Vit hava avbjóðingar, bæði í mun til at hava hóskandi høli og starvsfólk á vælferðarøkinum. Fyri at gagnnýta starvsfólkaorkuna betur, styrkja fakligheitina, og við hesum eisini veita eina betri tænastu, er í stóran mun neyðugt at byggja størri eindir, sum tó eru skipaðar í smærri eindum, við atliti at teimum ymsu málbólkunum.

Saman við avvarðandi pørtum er landsstýriskvinnan farin undir at gera eina langtíðarætlan, sum byggir víðari á arbeiðið, ið undanfarna samgonga setti í verk. Ætlanin er at gera eina ætlan fyri komandi tíggju árini, ið skal virka við til, at tørvurin á bústovnum, umlætting og frítíðartilboðum til fólk, ið bera brek, verður nøktaður.

Ætlanin fevnir um at byggja bústovnar, sambýlir, umlættingartilboð og virknistilboð, harundir frítíðartilboð. Miðað verður eftir at fara undir at byggja í minsta lagi ein stovn um árið komandi árini. Bygt verður kring alt landið eftir tørvi.

Í løtuni eru tríggjar byggiverkætlanir í gongd í miðstaðarøkinum, ið fara at økja um talið av plássum til bú-, umlættingar- og frítíðartilboð. Tveir av hesum stovnum lata eftir ætlan upp í ár, og tann triði væntandi um ársskiftið í 2023/2024.

Almannaverkið hevur gjørt leiguavtalu um ein stovn í Klaksvík, sum letur upp í ár. Í fíggjarlógaruppskotinum, sum verður lagt fyri Løgtingið í næstum, heldur landsstýriskvinnan harumframt fast við ætlanina, sum var í fíggjarlógaruppskotinum, ið fall burtur, at játta pening til ein stovn í Suðuroy. Báðir stovnar fara at hava bútilboð og umlætting. Eisini byggir Bústaðir búfelagsskapir, sum Almannaverkið ávísir til.

Samstundis sum at arbeitt verður við eini langtíðarætlan, verður støðugt arbeitt við at útvega hóskandi høli og starvsfólk fyri at gera tað møguligt at veita teimum á bíðilista neyðuga tænastu.

Tørvurin á frítíðartilboði broytist frá børn eru um 10 ár til tey gerast 18 ára gomul. Ásannandi at fleiri av børnunum ikki tørva dagligt tilboð, arbeiðir Almannaverkið harumframt við klubbtilboðum um kvøldið nakrar dagar um vikuna til ung. Høvuðsendamálið er tá at geva teimum ungu eitt tilboð, sum líkist tí, ið ung fólk annars hava at fara til í frítíðini, og at tey gerast partur av einum netverki, sum kann brúkast aftrat skipaða tilboðnum, og bæði kann virka motiverandi og mennandi fyri tey.

Tórshavn, 3. februar 2023

Sirið Stenberg
landsstýrismaður